# Gongutúrur í Gjógvardal

Annan sunnudag, tað er: 31. august skipar Árnafjarðar Róðrarfelag fyri gongutúri yvir í Gjóvardal. Hetta er áhugavert stað fyri bygdarfólkið og onnur við, tí tað var her at menn skóru torv í síni tíð. Við á túrinum verða eisini frásøgufólk, so alt verður gjørt fyri at geva fólki eina góða uppliving. Eftir túrin, sum væntandi tekur einar 5-6 tímar, verður ábit í Róðrarneystinum í Árnafirði (myndin), og hevur verið eisini lutakast millum gongufólkið um eitt lamb til heystar. Neyðugt er at tekna seg á Kunningarstovuni í Klaksvík.



# Klárt til Fjarðafestivalin

**Í Skálafirði:** Komandi vikuskifti verður árligi Fjarðafestivalurin hildin í Kelduni í Skálabotni. Hóast høvuðsnavnið til henda tónleikafestivalin gav avboð, hava fyrireikararnir kortini megnað at samanseta eina spennandi skrá til teir báðar pallarnar, sum koma at mynda tiltakið. Ein pallur verður uttanfyri, meðan pallurin í salinum, og sum vanliga verður brúktir til tiltøkini hjá samkomuni, verður hin pallurin. Fleiri møguleikar verða hjá fólki at koma til festivalin. Tey flestu taka helst bilin við, men møguleiki er haraftrat at taka tjald og kampingvogn við ella bátin, ið kann liggja tryggur í bátahylinum í Skálafirði.



*- Í dag vilja fólk ikki bert hava eitt arbeiði. Tey vilja eisini hava okkurt at gera og fara til í frítíðini, sigur Signhild Joensen á Trøllanesi*

# Bygdarlívið er gott, men ...

Tað eru, sum longu nevnt 17 ár síðani Signhild giftist til Trøllanesar.

Tá hon skal líta aftur um bak, kann hon bara staðfesta, at hon livdi rættiliga avskorin tey fyrstu 14 árini, tí ferðasambandið ikki var nøktandi. Hesi árini gekk tíðin fyri tað mesta við at taka sær av húsi, heimi og børnum.

- Nú eru børnini vorðin tað eldri, eins og ferðasambandið til Klaksvíkar er vorðin nógv betri. Eg eri nú farin til Klaksvíkar at arbeiða, og er tað eins og ein nýggjur heimur hevur latið seg upp fyri mær, nú eg eri komin aftur til røturnar í heimbýnum.

Í Trøllanesi búgva í dag 22 fólk, meðan talið tvey tey seinastu árini var uppi á 27. Ein veruleiki er kortini hann, at fólkatalið kann fara at minka uppaftur meiri í framtíðini, tí í løtuni er bert eitt einstakt barn undir skúlaaldur.

- Ein fylgja av hesum er tí, at tað verða helst ikki fleiri fólk í bygdini í framtíðini, enn hvat tað higartil hava verið, sigur hon.

Hinvegin er hon sannførd um, at tað ber heldur ikki so væl til, av teirri einfaldu orsøk at fíggjarliga grundarlagið hjá fólki er so avmarkað.

Hóast strandfaraskipið SAM siglir upp í níggju ferðir um dagin, og hóast regluligt samband er við bussi til Syðradals, so er hetta ikki nóg mikið til at fáa fólk at støðast í eini slíkari bygd.

- Í dag vilja fólk ikki bert hava eitt arbeiði. Tey vilja eisini hava okkurt at gera og fara til í frítíðini. Hesir møguleikarnir eru so smáir, at ilt er at nøkta tørvin hjá øllum pørtum her á staðnum.

- Tí velja helst fleiri at verða búgvandi í stórbýnum, heldur enn úti á bygd, sigur Signhild Joensen.

*Nei, hetta var eingin tung avgerð at taka (at flyta úr Klaksvík til Trøllanesar, blðm.), sum onkur kanska vildi hildið. Men um avgerðin hevði verið eins einføld at tikið í dag, - tja, tað er ein heilt annar spurningur*

*Eg eri nú farin til Klaksvíkar at arbeiða, og er tað eins og ein nýggjur heimur hevur latið seg upp fyri mær, nú eg eri komin aftur til røturnar í heimbýnum*

## FAKTA

**Íbúgvarar á Trøllanesi**

Aldursbýtið millum fólkið á Trøllanesi er rættiliga spjatt, hóast tey bert eru 22 í tali.

Sambært einum yvirliti hjá Hagstovuni er býtið hetta:

| | |
|---|---|
| 0-10 | 4 fólk |
| 11-20 | 8 fólk |
| 21-30 | 0 fólk |
| 31-40 | 4 fólk |
| 41-50 | 2 fólk |
| 51-60 | 0 fólk |
| 61-70 | 2 fólk |
| 71-80 | 2 fólk |
| 81- | 0 fólk |





# The very best of Word, Excel, Outlook & PowerPoint

**Brúkar tú** Word, Outlook, Excel og Power Point í tínum dagliga arbeiði? Gjørt tú tingini uppá tann ósmarta mátan við fult av umvegum?

**Kundi tú hugsa tær** at fingið ein lættari dagligdag við hjálp av forritunum? Svarar tú ja uppá hesar spurningar, er stundin komin at arbeiða eitt sindur smartari og gagnnýta tey amboð tú longu allíkavæl hevur.

**Skeiðið hevur fingið** sera góðar eftirmetingar.

**Tú lærir alt millum himmal og jørð**

um myndir • brottalvur • stór skjøl • brøv teldupostar • etikettir • samanspælið millum Word og hini Office forritini • stýra teldupostunum • kalendarin • fundarinnkalling • avtalur • uppgávufunkan • kontaktpersónar • tíðindi til kundar formlar formatera cellir • kolonnir • rekkjur • ørk finna data • yvirlit yvir stórar mongdir av upplýsingum • innihaldsyvirlit • filtur skiljing • subtotalir • ritmyndir • formar tekniamboð • møguleikar við slóðum • kopiera frá excel uppá tann fixa mátan

**Vælkomin** til tiltøk hjá Synergi

**Max. 14 luttakarar**

**Tilmelding**
Les meira og tekna teg á heimasíðu okkara á www.synergi.fo • tel 32BELL (322355)

Synergi

Synergi • Tvørgøta 1 • 100 Tórshavn • www.synergi.fo • synergi@synergi.fo
32BELL (322355) • 322FAX (322329) • skype: synergiasa